# Bill Justinussen í hernað ímóti misnýtslu

**Hann fer nú at kalla alskyns feløg og stovnar saman til fundar at tosa um misnýtslu í víðastu merking**

MISNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*



Bill Justinussen, Landsstýrismaður í heilsumálum, ætlar sær nú rættiliga í hernað ímóti misnýtslu.

Og tað er misnýtslu í víðastu merking, hann hugsar um.

Tí fer hann nú at taka stig til ein fund ímillum øll møgulig feløg og stovnar um fyribyrging.

– Endamálið við tí fundinum er at vita um tað ikki ber til at samskipa fyribyrgingararbeiði betur enn tað nú er.

Hann hugsar bæði um fyribyrging ímóti rúsdrekka, rúsevnum, royking, kynsligari misnýtslu og doping.

Men hann hugsar eisini um fyribyrging ímóti øllum øðrum, sum er við til at bróta heilsuna niður, eitt nú hugsar hann um at at gera ein roynd at fáa fólk at hugsa meiri um, hvat tey eta.

Hann hugsar millum annað, um at boðsenda Blákross, ÍSF, Kris, Mentamálaráðið, fjølmiðlar, løgregluna, ungdómsfeløg, skótar, Føroya Ungdómsráð og annars øll feløg og allar stovnar, sum hugsast kunnu og sum hava fyribyrging á dagsskránni.

– Tað eru nógvir stovnar og nógv feløg, sum gera eitt fyribyrgjandi arbeiðið av øllum møguligum slagi og endamálið við fundinum er at taka allar stovnar og feløg í samfelagnum, sum fáast við fyribyrgjandi arbeiði fyri at vita, um tað ikki ber til at samansjóða arbeiðið.

Hann hugsar m.a. um at Blákross hevur eina ógvuliga góða verkætlan um at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka.

Samstundis hevur eisini Ítróttarsamband Føroya eisini sínar hugsanir um fyribyrging ímóti rúsdrekka.

– Men tað kundi verið eitt hugskot, um ÍSF eisini brúkti verkætlanina hjá Blákrossi.

Hinvegin hevur Ítróttarsambandið gjørt eitt ávíst arbeiðið fyri at fyribyrgja at børn verða misnýtt kynsliga og fyribyrging ímóti doping.

– Men hetta arbeiðið hjá ÍSF kundi eisini komið til nyttu aðrastaðni, eitt nú á dagstovnum og aðrastaðni.

Bill Justinussen sigur, at tær royndir og tað tilfar, ein felagsskapur ella ein stovnur, brúkar, kann eisini koma øðrum til góðar.

– Soleiðis kundu vit sloppið undan, at sama arbeiðið verður gjørt fleiri ferðir, tí tað er tað ongin orsøk til.

– Eitt nú gera eisini skúlarnir eitt ávís fyribyrgjandi arbeiðið við at vísa á vandarnar við at roykja og drekka. Í tí sambandið er eitt savn av undirvísingartilfari á Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð.

– Tað kundi verið eitt hugskot at latið tilfarið, sum Blákross, ÍSF og aðrir felagsskapir hava gjørt, eisini verið á Landsmiðstøðini og blivð ein partur av undirvísingartilfarinum so at tað eisini kom skúlunum til góðar.

– Í løtuni sita stovnar og feløg í hvør sínum lagi og gera sama arbeiði í nógvum førum og eg haldi, at tað hevði verið ein stórur fyrimunur at sloppið undan tí.

– Tað eru so nógvar ítøkiligar ætlanir á nógvum økjum og skulu allar hesar ætlanir á fíggjarlógina umvegis Mentamálaráðið ella Trivnaðarráðið, er vandi fyri at vit koma at játta pening til fleiri verkætlanir at sama slagið og tað er ikki skilagott.

– Verður arbeiðið hinvegin samskipað, kunnu vit sleppa undan at játtað pening fleiri ferðir til sama endamál.

Landsstýrismaðurin sigur, at samstundis hava vit Fyribyrgingarráðið, sum kann seta undirbólkar at taka sær av ymsum økjum.

## Stóra Pakkhús í Vági vil hava skeinkiloyvi



**Vágs Býráð mælir til, at Pakkhúsið fær loyvi at skeinkja øl og vín**

SKEINKILOYVI
*Áki Bertholdsen*

Nú eru útslit til, at suðuroyingar fáa eitt stað afturat, har tað ber til at keypa øl og vín.

Mentanarhúsið, Stóra Pakkhús, í Vági, hevur søkt um at fáa matstovu og skeinkiloyvi til øl og vín.

Í Stóra Pakkhúsi verður skipað fyri alskyns tiltøkum, fundum, fyrilestrum, filmi o.s.fr. og nú er so eisini ætlanin at fáa matstovu og skeinkiloyvi til teir dagarnir, húsið er opið.

Loyvisnevndin hevur nú sent Vágs Kommunu umsóknina til ummælis og Býráðið hevur nú samtykt at viðmæla, at Stóra Pakkhús fær skeinkiloyvi.

# Seta elektroniskan ferðgáa upp í Vági

**Bilarnir sum koma til Vágs norðan av oyggj, koyra ov skjótt og tí fer kommunan at taka stig til at fáa ferðina niður**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*



Vágs Kommuna fer nú undir eina roynd at fáa bilarnar at koyra spakiligari, sum koma inn í bygdina eftir landsvegnum koyra norðan av oyggj.

Dánjal Bjarkhamar, formaður í teknisku nevnd hjá Býráðnum, sigur, at Býráðið fær ofta at vita frá fólki, sum búgva framvið vegnum, at bilarnir, sum koma inn í bygdina eftir landsvegnum, koyra mangan ov skjótt.

Tí hava tey ampa av at lata børnini verða úti, og tey hava heitt á kommununa um at seta ferðsluforðing upp, fyri at fáa bilarnar at koyra hampiligari.

Men kommunan kann ikki uttan víðari seta ferðsluforðingar upp á einum landsvegi og sostatt tarna flutningi á vegnum.

Hinvegin hevur býráðið samtykt at spyrja Landsverkfrøðingin um tað ikki ber til at seta ferðgáar upp á hesum vegastrekki.

Ein ferðgái er elektroniskt tól, sum mátar ferðina á bilinum og vísir ferðina á einum stórum ljósskelti, sum stendur við vegin og ger sostatt bilførarar varugar við, hvusssu skjótt teir koyra.

Hesir ferðgáar eru royndir aðrastaðni við sera góðum úrslitið, tí tað er heilt týðiligt, at tað hevur tálmandi ávirkan á bilførarar, at teir síggja á stórum skelti, hvussu skjótt teir koyra.

Býráðið ætlar ikki at keypa ferðgáa, men ætlar at fáa avtalu í lag við landsverkfrøðingin um at læna ein ella tveir ferðgáar at seta upp við bygdarmarkið og at royna skipanina, áðrenn støða verður tikin til keyp.



# Føroyska ferðavinnan á World Travel Mart

**Í døgunum 11. til 14. november var stóra World Travel Mart stevnan í London. Her luttók eisini føroyska ferðavinnan**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*




*Føroyska ferðavinnan við umboðum frá Atlantic Airways, Smyril Line og Ferðaráði Føroya, var í seinastu viku á World Travel Mart í London*

Føroyska ferðavinnan hevur í seinastu viku verið á World Travel Mart í London.

Umboð frá Atlantic Airways, Smyril Line og Ferðaráð Føroya vóru við á stevnuni.

– Áhugin kring Føroyar vísir seg at vera ógvuliga stórur, sigur Kent L. Christensen, sølu- og marknaðarleiðari á Atlantic Airways.

– Føroyar verða lýstar sum eitt trygt stað at fara, har fólkið fær høvið at hitta náttúruna í einum friðarligum umhvørvi. Og serliga nú, at tað vísir seg at vera ógvuliga ófriðarligt kring heimin, vísir tað seg, at áhugin er vaksandi fyri Føroyum.

World Travel Mart í London er ein av høvuðsmessunum, sum ferðavinnan í Føroyum luttekur á.

– Øll ferðavinnan í hesum partinum av heiminum hittist á World Travel Mart, og øll tey tingini, sum verða tosað um í telefon, verða ordnað, tá vit so hittast í London, greiðir Kent Christensen frá.

Messan vardi í fýra dagar. Tveir teir fyrstu vóru fakdagar, men tveir teir seinastu vóru ætlaðir áskoðarum.

– Fyrri áskoðaradagurin gekk væl og nógv fólk vóru og vitjaðu. Men av tí, at brandmenninir í London fóru í verkfall tann seinna dagin vóru ikki so nógv fólk tá. Messan var á einum staði, sum eitur Xcel, eitt sindur uttanfyri býin í einum parti, sum eitur Dockland, og tað tekur eitt sindur av tíð at koma hartil frá miðbýnum í London. Og av tí, at brandmenninir fóru í verkfall, vóru tað fleiri, sum settust aftur, halda vit, sigur Kent Christensen at enda.

## Gloymdi at boða frá

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Brimil kom fríggjakvøldið fram á ein hetlendskan trolara, sum var komin inn á føroyskan sjógv uttan at boða frá.

Trolarin fekk eitt sektaruppskot áljóðandi 100.000 krónur, og hann tók við tí. Í hesum førinum varð onki av útgerðini konfiskerað.

## Nógv innbrot

**Seinastu tíðina hava fleiri innbrot verið í Havnini. Politiið heitir tí á fólk um at minnast til at læsa hurðarnar áðrenn tey fara frá húsum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Seinastu vikurnara hava fleiri innbrot verið í Havnini í økinum Villingardagsvegurin-Sundsvegurin og síðugøturnar har.

Talan er um innbrot, har brennivín og annað er tikið.

– Vit halda, at tað eru ung fólk, sum standa aftanfyri innbrotini, tí í flestu førum er tað rúsdrekka, sum verður tikið. Øl og onkuntíð er onkur whiskeyfløska horvin, sigur Palli Augustinussen á kriminaldeildini.

Palli Augustinussen sigur, at tjóvaríini henda sum oftast har, sum hurðar hava staðið ólæstar, og heitir tí á fólk um at læsa hurðarnar áðrenn tey fara frá húsum.

– Flestu innbrotini eru hend millum klokkan eitt og fýra um dagin. Fólk skulu tí læsa húsini, tá tey fara til arbeiðis og annað, tí tað er so skjótt at leypa inn og taka okkurt. Eisini í durum, har jakkar og tílíkt hanga, eru ofta fartelefonir og visakort í lummunum, og tað er skjótt at fara avstað við.

Eisini heitir politiið fólk á, um at lata vera við at goyma lykilin til húsini á einum alt ov sjónligum staðið og ikki ov nær hurðina.

# Eldur í á Giljanesi

ELDSBRUNI
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjadagin kom eldur í eini hús á Giljanesi. Politiið í Miðvági metir, at eldsbrunin er komin av einum skammlopi í sjónvarpinum, sum stóð á standby.

Væl gekk at sløkkja, men húsini eru farin rættiliga illa innan.

Ein maður lá og svav í húsunum, tá eldur kom í, men tveir ungir dreingir fingu brotið hurðina inn og hjálpt manninum út. Høvdu teir ikki gjørt hetta, hevði maðurin helst verið deyður, sigur vakthavandi á politistøðini í Miðvági.



*Eldur kom fríggjadagin í hesi húsini í Miðvági. Ein maður var í húsunum, men við hjálp av tveimum ungum dreingjum slapp hann út í øllum góðum*

*Mynd: Edvard Joensen*

